


*Nr. 21* *15. oktober 2017* *77. árg.*

# Eg og hús mítt vilja tæna Harranum

*Men líkar tykkum ikki at tæna Harranum, so kjósið í dag, hvørjum tit vilja tæna, gudum teimum, sum fedrar tykkara dýrkaðu hinumegin ánna, ella gudum Amorita, í hvørja landi tit nú búgva; men eg og hús mítt vilja tæna Harranum.*
*Jos. 24,15.*

Mong víkja uttan um kallið at gerast ein kristin, tí tey síggja fyri sær eitt lív, har tey ikki sjálvi taka avgerðina, men mugu boyggja seg undir Guds vilja. Tað kunnu tey ikki hugsa sær. Tey vilja sjálvi velja, hvussu tey skulu liva.

Josva setir ikki Ísrael yvir fyri einum slíkum alternativi. Tað finst nevniliga ikki. Í síni skilnaðartalu til fólkið sigur Josva, at um tey ikki vilja tæna Harranum, mugu tey velja millum teir avgudar, ið tey dýrka, og sum búgva uttan um tey. At tæna merkir her ikki bara at arbeiða fyri, men at tilhoyra og boyggja seg fyri. Um hann og hús hansara vilja tæna Harranum, merkir tað, at tey vilja boyggja seg fyri honum, akta hann og gera vilja hansara. Um fólkið ikki vil tað, mugu tey velja, hvørjum tey so vilja boyggja seg fyri og akta.

Veruleikin er, at vit øll somul tilvitandi ella ótilvitandi eru tengd at onkrum. Tað kunna vera øðrum menniskjum, ideologium, lívshátti ella okkara egna lyndi og ynskjum. Tað er ovmikið av avgudum at velja ímillum. Ikki slepst undan at velja. Og um vit royna tað, velja kringumstøðurnar ella tað, vit møta í lívinum, fyri okkum.

Umráðandi er, at vit vita, hvørjum vit velja at boyggja okkum fyri og akta. Josva og hús hansara valdu at boyggja seg fyri Harranum, sum tey høvdu sannað, var bæði mektugur og góður. Harrin hevði fríað tey út úr trældóminum í Egyptalandi og ført tey inn í lovaða landið til eitt lív í frælsi undir signing hansara. Harvið sluppu tey undan at tæna øllum møguligum avgudum, sum aldri hildu tað, teir lovaðu, og sum fyrr ella seinni sviku.

Kanska treingja vit í dag til at endurnýggja lyftið um at tæna Harranum, boyggja okkum fyri honum og leggja lív okkara í hendur hansara.

*Lat lívsins keldur flóta,*
*sum bjargan okkum ber!*
*Lat fólkið frið tín njóta!*
*Og meðan tíð øll fer,*
*lat halgast høgt títt navn,*
*so faðirin kann taka*
*sær fjølment lið í favn.*

# Guds friður

*Verið ikki stúrnir fyri nøkrum, men latið í øllum lutum tráan tykkara koma fram fyri Gud í ákallan og bøn við tøkk, og Guds friður, sum ber av øllum viti, skal varðveita hjørtu tykkara og hugsanir tykkara í Kristi Jesusi.*

*Fil. 4,6-7.*

Sadhu Sundar Singh (1889 – 1927), sum hvarv á eini missiónsferð í Tibet, sigur frá eini undursamari bjarging úr einum brotsmannahelli í Tibet:

„Hin likamliga líðingin var stór; men í andanum var eg eydnuríkur. Eg gjørdi bøn til Guds, og gleði hansara streymaði ígjøgnum hjarta mítt, so eg fullkomiliga gloymdi hesa óhugnaligu holuna, har eg var. Ein undurfullur friður fylti hjarta mítt, so gleðiligur, at eg ikki megni at lýsa hann.

Hvussu kundi eg á myrku náttini - uttan um meg rotin bein og lík - kortini eiga Guds frið í hjarta mínum? Ein tílíkan frið og eina tílíka gleði kann heimurin ikki geva. Bara Gud kann! Meðan eg var í hesi holuni, kom fram fyri meg, at slíka gleði kendi eg ikki, tá ið eg búði í heimi mínum og hevði allar hent-

leikar. Av hvørjum kom tað, at gleðin streymaði ígjøgnum meg og fylti meg í hesi myrku holuni?

Tað gjørdist týðiligari fyri mær enn nakrantíð fyrr, at Jesus livir, og hann var tað, sum gav hjarta mínum frið og gleði. Eitt undur var tað, at Jesus í øllum hesum líðingunum fylti hjarta mítt við friði."

Hetta undrið var fyri Sadhu Sundar Singh størri enn bjargingarundrið. Og er tað ikki so, kæri lesari – at Guds friður í hjørtum okkara – enntá í ódn og stríði – ber av øllum viti?

*t.* týddi.

# Kongurin, sum einki legði í profetiið

Afghanski kongurin Zahir Shah gav í 1959 loyvi at byggja eina kirkju í landsins høvduðsstaði, Kabul. Hetta loyvið varð givið, av tí at amerikanski forsetin Eisenhower hevði givið einari mosku byggiloyvi í Washington D.C., høvuðsstaðnum í USA.

Kirkjan í Kabul varð vígd í 1970, men longu í 1973 komu afghanskir hermenn inn og fóru undir at bróta múrin kring kirkjuna niður, og guvernørurin í Kabul gav meinigheitini boð um at lata kirkjuna frá sær, tí hon skuldi takast niður. Meinigheitin svaraði, at tað kundu tey ikki, við tað at bygningurin var vígdur til Guds.

Eina kirkju fyri eina mosku, hatta riggaði altso ikki. Men hoyr nú um eitt ávarandi profeti, og hvat ið stendst av tí, tá ið fólk ikki vilja akta.

Ein týskur handilsmaður fór til guvernørin – hann var djarvur, mugu vit siga. Handilsmaðurin segði við hann: „Um tín stjórn nemur við hetta Gudshúsið, fer Gud at reka títt stýri frá." Hóast mangar altjóða áheitanir og eisini eina frá tí viðgitna evangelistinum Billy Graham á kongin at steðga niðurbrótingini, helt hon á og varð fullførd 17. juli 1973. Somu nátt varð stjórnin feld við einum kvetti! Landið hevði verið kongadømi í 227 ár, og nú gjørdist tað eitt tjóðveldi við systkinabarni kongs, Sadar Mohammed Daoud Khan sum forseta. Hann varð sjálvur myrdur í sambandi við eitt kommunistiskt kvett í 1978, og í 1979 kom sovjettiska innrásin.

Harrin letur ikki alt um seg ganga. „Her til og ikki longur," sigur Hann. Skriftin lærir okkum, at Gud er søgunnar Gud: „Hann koyrir kongar frá, og hann skipar kongar." Dán. 2,21.

*Effie Campbell* umsetti.

# Kærleiki undir øllum umstøðum

Hetta verður sagt um ein drong, sum livdi í Leeds í Onglandi fyri mongum árum síðani**:** Pápin doyði, og mamman mátti strevast bæði tíðliga og seint fyri at klára seg. Drongurin var rættiliga følin og dugdi ikki væl at ansa sær. Mamman ávaraði hann um ikki at spæla á einum byggiplássi har í nánd; men tað gjørdi hann kortini og fekk álvarsligan skaða. Á sjúkrahúsinum fekk hann av óvart at hoyra eina sjúkrasystur siga við onkran, at drongurin aldri aftur fór at kunna ganga. Tá ið mamman kom at vitja, spurdi hann hana beint fram: „Mamma, ert tú góð við meg?" „Ja, sjálvandi eri eg góð við teg." „So er alt í lagi,"segði drongurin. „Eg havi hoyrt, at eg aldri aftur fái gingið. Men um tú fyrigevur mær og elskar meg, fari eg at kunna klára restina."

Bíblian sigur, at Guds børn eru útvald í Kristi, áðrenn grundvøllur heimsins varð lagdur, at vit skuldu vera heilagir og lýtaleysir fyri ásjón hansara." (Efes.1,4).

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 15. okt. | Tekstur: 1.Mós. 28,10-22 | bíbliuorð: 5.Mós.4,39 |
| 22. okt. | Tekstur: 1.Mós.29,1-30+31,2-3+33,1-11 | bíbliuorð: Mós. 31,3 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Repro– & prent:** Prenta, 35 77 74




***Nr. 22*** ***29. oktober 2017*** ***77. árg.***

# Kirkjunnar grundvøllur

*Men eg sigi tær eisini: Tú ert Pætur: (tað merkir: ein klettur), og á hesum kletti vil eg grunda kirkju mína, og helheims portur skulu ikki fáa vald á henni.*

*Matt.16,18.*

Grundarlagið er týdningarmikið. Svíkur tað, skramblar alt saman, hvussu vakur og hugtakandi bygningurin so er. Tað sama kann sigast um kirkjunnar grundvøll, sum Jesus her talar um. Gjøgnum tíðirnar hevur kirkjan livað undir ógvuliga skiftandi umstøðum og verið undir støðugum álopum frá fólki sum ynskti, at hon lá í skeljasori.

Jesus er upptikin av, at kirkja hansara yvirlivir. Tað hava mong fólk eisini seinni verið. Men mong teirra hava ikki verið tað á sama hátt sum Jesus. Tey hava lagt dent á, at kirkjan hevur vald og nógvar limir, at hon er nógv umhildin, er væl skipað og hevur flottar bygningar. Alt hetta kann vera gott, men tað er ikki nakað av hesum, sum tryggjar kirkjuna móti at falla og at verða uppslúkta av mótstøðuni móti henni. Tað er grundvøllurin, sum tryggjar kirkjuna og ger hana til eina sanna Jesu Kristi kirkju.

Her sigur Jesus, at grundvøllurin er kristusjáttan Pæturs: ***Tú ert Kristus, sonur hins livandi Guds.*** So leingi henda játtanin sleppur at ljóða, stendur kirkjan trygg. Mangt av ytru umstøðunum kann víst falla og bera við sær, at kirkjan ikki verður so væl umtókt og hugtakandi.

Men so leingi kirkjan hevur eina klára játtan á Jesus Kristus, vikast hon ikki, og helheims portur skulu ikki fáa vald á henni.

***Føgur var fjøldin, ið forðum fann***
***frelsa í fedranna kirkju,***
***nú kemur framtíðin okkum ann,***
***kristnaður ungdómur einans kann***
***vera vár vón og várt virki.***

# Ikki sum hini

*Rørið, ið brákað er, skal hann ikki bróta. Jes. 42,3.*

Sum tað er gott, at tað er ein, ið ikki er sum hini. Menniskju eru so óført at leggja stein oman á byrðu. Er onkur komin í ófóri, eru vit menniskju sein at hjálpa viðkomandi. Men soleiðis er Harrin ikki! Brotna vit, er hann til reiðar at hjálpa okkum. Detta vit, vil hann fegin reisa okkum aftur. Harrin vil onga stjørnu sløkkja, syngur yrkjarin.

Hetta er ikki bara galdandi í andaligum viðurskiftum, men eisini í tímiligum. Mong ungfólk vitna um, at tá ið tey vóru við undirlutan, eftir at alt eina tíð hevði lagað seg væl hjá teimum, var Harrin hin einasti, sum hjálpti teimum. Hann hevur samkenslu við okkum.

Ungfólk byrja tó sjáldan sum brákað rør – heldur sum tey, ið vita skil á øllum og skulu skipa sítt lív sjálvi, og væl verði teimum! Men rørið er veikt og kann brotna. Lukkuligur er tá hin veiki, sum heldur seg til hansara, ið ikki brýtur hitt brákaða rørið!

*t.* týddi.

# Tann sanni vegurin

Uttan á summum Bíblium stendur við gullstavum ***Tann heilaga skriftin.*** Hví er Bíblian tann heilaga skriftum, hóast tú í henni kanst lesa um ræðuligar hendingar? Vit lesa um menniskju, sum hata, drepa, fylgja sínum egnu lystum og snýta onnur. Kann Bíblian kortini vera ein heilag bók?

Ja, tí Bíblian sigur okkum sannleikan. Hon endurgevur okkum sannleikan um Gud, um menniskju og um djevulin.

Jesus Kristus er tann størsti sannleikin. Hann fortaldi um sannleikan, og hann steig fram á sanna mátan og segði, at sannleikin skal fría menniskju.

Ja, Jesus er tann einasti og sanni vegurin til Guds. Tað segði hann sjálvur lærusveinum sínum. ***„Eg eri vegurin og sannleikin og lívið. Ongin kemur til faðirin uttan við mær.“***

(Jóh.14,6).

# Misskilt

Andrew Sloan greiddi í einari talu frá einari hending. Henda hending er helst ikki farin fram í Føroyum; men tað kundi hon fyri tann skuld væl havt gjørt:

Tað oysregnaði. Ein maður kom gangandi oman eftir eini gøtu. Tá sá hann eina sjáldsama sjón. Hann sá ein mann standa við ein húsavegg beint niðri undir einari takrennu, sum var brotin. Regnið fossaði niður á høvdið á manninum og víðari niður eftir kroppinum.

Hesin maðurin helt tað vera stak løgið og fór yvir til hin og spurdi: “Sig mær, hví stendur tú her? Tú ert jú á kroppi, so dýggjvátur.”

“Tað skal eg so væl siga tær,” svaraði hin aftur, “tá ið eg var drongur, bað pápi meg fara eini ørindi fyri seg. Eg segði nei, tí regnið oysti niður eins og í dag. Tað var ikki av ongum, at pápi bað meg gera hetta fyri seg, tí hann var veikur. So mátti pápi fara sjálvur. Hann var so rennvátur, tá ið hann kom aftur. Hann fekk lungnabruna, legðist á songina og doyði. Tað var mín skyld, og eg havi øgiliga ringa samvitsku av hesum, og nú átaki eg mær av fríum vilja hesa revsingina fyri at skola hesa skuldina av mær.”

Maðurin kundi ikki fyrigeva sær sjálvum; men hann hevði púra misskilt støðuna, sum hann var komin í. Skriftin sigur: “Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi. – Blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd.” (1. Jóh. 1,9&7) Ja, Jesus tók alt upp á seg, og hansara blóð reinsar okkum frá allari, allari synd, tá ið vit játta tær fyri honum. Jesu blóð reinsar so væl, at vit gerast hvítari enn snjó. (Sálm. 51,9) Hann hevur gjørt verkið fyri 2000 árum síðani, og hann sigur við teg: “So er tá nú eingin fordøming fyri tey, sum eru í Kristi Jesusi.” (Róm. 8,1)

*Effie Campbell.*

# Eini boð frá Gudi

Ein gomul trúgvandi kona segði mær frá hesum: „Sonur mín las niðri á universitetinum. So skuldi hann koma heim til Føroya eitt skifti. Eg sendi honum pengar fyri ferðaseðilin.

Beint eftir hetta verði eg sterkt ámint um at senda honum 200 kr í einum brævbjálva. Eg skúgvaði hetta burtur frá mær, tí eg hevði júst sent honum pengar. Men eg fekk ikki frið fyri hesum, eg slapp ikki burtur úr hesum tonkunum, og tí gjørdi eg eftir hesi áminningini.

Nakrar dagar seinni kom sonurin heim. Hann gav sær ikki stundir at siga góðan dag, tá ið hann fetaði eftir køksgólvinum og fall mær um hálsin og segði: „Sum tað var gott, mamma, at tú sendi mær hasar 200 krónurnar!"

Síðani greiddi hann frá, at hann hevði borið ymiskt út í tún, og úthurðin hevði staðið opin, men brádliga smekkar hon í, og har stendur hann og fekk ikki útvegað sær nakran lykil. So mátti hann fara til lásasmiðin, og tað kostaði 200 kr.

Ja, so gjølla fylgir Harrin við."

*Effie Campbell.*

# Lívsins træ

Bíblian byrjar við frásøgnini um lívsins træ (1. Mós. 2,9), og hon endar eisini við frásøgnini um lívsins træ (Opb. 22,2). Tað eru mangir træðrir, ið peika fram móti frelsuni.

Nóa ark er eitt stórt loyndarmál. Tá ið tú sært arkina uttanífrá, er hon ein risavaksin træbátur, sum á gátuføran hátt rekur um á lívsins vatni. Trøini, sum Nóa ark er bygd úr, verja lívið á sama hátt sum lívsins træ. Fjalt fyri heiminum rúmar hesin yvirvaksni báturin eitt loyndarmál um tað æviga lívið.

Jesus doyði á krossins træi, og har var hann okkum til bjarging og vann okkum ævigt lív, um vit takka og taka ímóti tí.

*Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 29. okt. | Tekstur: | Matt.28,18-20; Mark.10,13-16; 1.Pæt.1,3 | bíbliuorð: | Mark. 16,16a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Repro– & prent:** Prenta, 35 77 74